# Størsti hemarin higartil í kappingini



Teir tríggir sum fingu størsta hemarin í hemarakappingini higartil, f.v.: Pætur Johansen, Martin Restorff og Allan Bjarnason

Mynd: Jens Kristian Vang

**Týsdagin fingu tríggir ungir havnarmenn í glastrevjabátinum, Havfrúnni, ein hemara, sum vigaði 330 pund, hetta er størsti hemarin í hemarakappingini higartil**

VEIÐA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Týsdagin fyrrapart fóru tríggjar mans við glastrevjabátinum Havfrúnni av Havnini og settu tráðurnar út uttan fyri Kirkjubø um 11-tíðina, og tríggjar tímar seinni beit hemarin á. Tað tók teimum ein góðan tíma at fáa hemarin, ið vigaði 330 pund og var 2,45 m langur, inn í bátin.

Hóast tráðurnar eru gjørdar til endamálið, er tað ikki bara sum at siga tað at fáa ein so stóran hemara inn í bátin. Hesin er tann størsti hemarin í hemarakappingini higartil.

Hugskotið til hemarakappingina, sum byrjaði hálvan november í fjør, eigur Magni Blástein í Vestmanna, ið eisini stendur fyri kappingini, sum endar 1. mars 2006. Tann, sum hevur fingið tann størsta hemarin í hesum tíðarskeiðnum, fær høvuðsvinningin, sum er ein bjargingarbátur frá Tryggingarfelagnum Føroyar. Annar vinningur er eitt gávukort upp á 1.000 frá Jógvan Weihe, sum selur útgerðina til hemarafiskiskapin.




**Beinleiðis við bili úr Tórshavn til norsku skífjøllini**

Gloym alt um stress, væl stúvaðar bussar, knarrut børn og taskurok. Pakka børnini, viðførið og góða lagið í bilin heima í túninum, koyr umborð á Norrönu, njótið túrin umborð og koyrið vælúthvíld í land í Bergen – klár til eina frálíka familiuferiu.

HEMSEDAL: 2 fólk við bili á Skogstad Hotel, fyri hvønn úr kr. **4.864,-**

VOSS: 2 fólk við bili á Fleischers Hotel, fyri hvønn úr kr. **5.106,-**

**Íroknað prísin er:** Ferðin Tórshavn-Bergen fram og aftur í 2 koyggjukamari við bili. Hartil 7 nætur í dupultkamari. Á út- og heimferðini verður búð 1 nátt í Bergen á Thon Hotel Bergen Bryggen. Íroknaður morgunmatur. Avgreiðslugjald og oljuavgjald eru ikki íroknað.

J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 59 00
FAX 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

**HEMSEDAL:**
Royni t.d. »norsku alpurnar« Hemsedal 5 tímar frá Bergen. Njótið frálíku náttúruna, hugnaligu matstovurnar, kavan og sólina. Hemsedal hevur kavagaranti og ein av bestu skídeplunum í Europa.

**VOSS**
Einans 2 tímar frá Bergen við pistum fyri børn og vaksin. Kavagaranti, góðar liftir, hugnaligar matstovur og aktivitetir fyri stór og smá. Serlig tilboð til børn eru eisini á staðnum

**Áhugaverdar heimasíður:**
www.norlandia.no/skogstad
www.visitvoss.no/
www.fleischers.no

# Acryl í Ribarhúsi



Hósdagin klokkan 15 letur Hilmar J. Højgaard upp málningaframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði.

Hetta er fyrstu ferð, at Hilmar hevur framsýning í Fuglafirði, men nýggjur í listarhøpi er hann tó ikki. Eitt nú var hann seinasta ár í Íslandi, eins og hann seinni í ár fer at hava framsýningar á Gallerí Jinx í Havn og í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.

Talan er um á leið 20 acryl-málningar, sum taka støði í føroysku náttúruni, har ljósið, menniskjan, føroyski báturin o.a. verða avmyndað.

Framsýningin er opin til mikudagin 8. mars. Opið er mána- til fríggjadag frá 15.00 til 17.30. Leygardagar er opið frá 11 til 15.

**-mørk**



**Altíð tað nýggjasta**

**www.sosialurin.fo**